U19 í Portugal

Føroysku U19-kvinnurnar eru í hesum døgum í Portugal, har liðið tekur lut í EM-undankapping saman við Portugal, Noreg og Rumenia. Mikudagin fór hópurin avstað, og í dag klokkan 16 føroyska tíð er fyrsti dysturin á skránni, og er hesin ímóti Noreg. Á FSF-heimasíðuni verður sagt, at ferðin niður gekk væl, og at veðrið til fótbólt er av tí allarbesta – eini 20 til 25 hitastig.

ES stuðlar landsliðnum

Tá italska landsliðið fer á vøllin í HM-undankappingini, verður hetta gjørt við ES sum høvuðsstuðuli. Suðuritalska sóknin, Calabria, hevur nevnliga gjørt sponsorsáttmála, men hetta er við pengum, sum av ES eru oyramerktir til menning av økinum. Lokali forsetin metir tó, at hetta fer at fáa túsundtals ferðafólk til Calabria, men í ES-borgini eru tey í øðini um, at peningurin verður nýttur til hetta, heldur enn til at menna fátæka økið.

B36-B71:

Skerdir og trýstir sandoyingar

Stig skulu á kontina hjá B71, men tað verður enn eina ferð við einum skerdum hópi, at teir vitja hjá B36, sum stríðist fyri heiðursmerkjum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Stríðið um silvurmerkini í Formula-deildini er knallhart. Seinasta vikuskiftið datt B36 nakað niður í hesum stríðnum, og tað er nakað, sum teir vilja rætta uppá, tá teir sunnudagin taka ímóti B71.

Og B36 er eisini heilt hampuliga væl fyri undan dystinum. Í mun til seinast er Jákup á Borg komin aftur, eftir at hann sat uttan fyri við leikbanni, og eisini hevur Bergur Midjord vant í hesi vikuni, eftir at hann hevur drigist við vøddaskaða í búkinum.

B71 er í akuttum niðurflytingarvanda. Tí er kravið mest sum treytaleyst, at teir skulu hava stig við sær úr høvuðsstaðnum sunnudagin

Hinvegin er Klæmint Matras ikki tøkur sunnudagin, eftir at hann fekk reytt kort í tapinum í Runavík.

Skerdir sandoyingar

Hjá B71 kom tað illa við, at teir máttu úr Klaksvík uttan stig seinasta sunnudag, og tí er trýstið á teimum enn størri hesaferð, enn tað annars vildi verið.

Eftir leikbann seinast er Símin Hansen nú aftur tøkur, men tað eru tó aðrir spælarar, sum ikki eru við hesaferð. Bæði liðskiparin, Eirikur Poulsen, og óortodoski Gudmund Nielsen eru leikbannaðir, og tað er einki at ivast í, at hetta eru tveir spælarar, sum B71 illa kann vera fyriuttan, nú seinastu og avgerandi dystirnir standa fyri framman.

Bleyt byrjan

Í Havn verður spennandi at vita, um menningin hjá Kyndli stendur við, meðan Stjørnan og Neistin mugu roknast sum favorittar fyrsta umfarið

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er eingin ivi um, at Stjørnan longu nú verður mett sum stórfavorittur at endurvinna gullið í føroyskum kvinnuhondbólti.

Spennandi verður at vita, um Kyndilskvinnur halda fast í framgongdini, sum liðið hevði í fjør

Fyrsta uppgávan tykist eisini vera hampuliga yvirkomulig, hóast júst StÍF, sum er mótstøðuliðið, ofta hevur havt hug at arga lokalu Stjørnurnar í Klaksvík. Ikki minst fysiskt eigur venjingarstøðan hjá Stjørnuni tó at vera somikið góð longu nú, at StÍF kann renna seg í eina veruliga maskinu, um illa vil til. Men hinvegin ræður eisini um hjá Stjørnuni at leggja europisku uppgávurnar aftur um bak og ásanna, at tað nú heimliga kappingin, sum tað snýr seg um.

Í Runavík eigur Neistin eisini at roknast sum favorittur, tá tær vitja uppflytarnar úr Tjaldri. Tjaldur var tó bert eitt mál frá at vinna seg í steypafinaluna í fjør, og tað er eingin ivi um, at liðið í dag er nakað nógv sterkari enn tað, sum fyri tveimum árum síðani flutti úr Sunset-deildini, so tað kundi væl hent seg, Neistin fær sína sak fyri í Runavík.

Og tað sama kann VB fáa í Havn. VB er um nakað styrkt í mun til í fjør, og skulu tær avgjørt roknast sum ein av heilt seriøsu bíðlunum til pláss í FM-finaluni. Men Kyndil hevði í fjør stóra framgongd, og til kappingina í vetur hevur liðið eisini fingið tilgongd av fleiri spælarum, so tað verður spennandi at síggja, hvat tær kunnu røkka í vetur.

Fleiri styrkiroyndir

Hóast talan bert er um fyrsta umfar í Atlantic Airways-kappingini, so er talan longu nú um tríggjar veruliga styrkiroyndir

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er enn hampuliga óvist, hvussu væl fyri ymsu liðini í føroysku manskappingini í hondbólti eru. Men uttan iva fæst partvíst svar upp á hetta, tá fyrstu dystirnir verða bríkslaðir ígongd sunnudagin.

Á Hálsi í Havn er grannauppgerð millum Kyndil og H71. Tann dysturin plagar ikki ganga serliga friðarliga fyri seg, og lítil ivi er um, at bæði Kyndil og H71 vilja nýta høvið til at prógvað, at tey avgjørt skulu teljast við í oddinum í ár.

Tað vilja VÍF og meistararnir úr Neistanum helst eisini, og tí kann talan lættliga gerast um satt brak, tá blást verður í gongd í Vestmanna.

Seinasti dysturin verður í Kollafirði, har KÍF tekur móti StÍF, og eisini her er talan um styrkiroynd millum tvey lið, sum ikki verða roknað millum favorittarnar, men sum tó avgjørt hava dygdirnar til væl og virðiliga at arga øll av hinum. Dysturin í Kollafirði er annars fluttur til klokkan 18, soleiðis at fólk á Kollfjarðarleiðini í friði og náðum kunnu fylgja við, hvussu leikur fer, tá fótbóltsliðið hjá EB/Streymi skal royna at vinna sær gullið frá verandi føroyameistarunum úr NSÍ.